# hann svam



*Fyri eygað er teinurin langur um Nólsoyarfjørð. Fyri tann tá 26 ára gamla Bjarna Bjarnastein tók tað slakar 2 tímar og 17 minuttir at svimja. - Eg gjørdi tað, tí eg hevði hug at gera tað, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

*Tað hevði verið spennandi at roynt Suðuroyarfjørð, úr Skúvoy til Sandvíkar. Men hvussu tað verður at gera hug til verk, tað veit eg ikki*

*Mangt broytist á mansins ævi. Tá Maria svam teinin, brúkti hon ein tíma longri enn eg. Men hygg nú. Teir sum svimja um fjørðin í dag, brúka ein tíma styttri enn eg*



*…ørra, bragdið,*



*Á ferðini úr Nólsoy til Havnar hevði Bjarni ein bát í fylgi við sær. Umborð á honum vóru - vinstrumegin Jónsvein Joensen, vitnið Hákun Jacobsen, og dómararnir báðir Tummas Juul Joensen og Olevinus Hansen*

# Næsta málið var Suðuroyarfjørður

**Tað er jú ikki á hvørjum degi, at fólk soleiðis leypa á bláman við tí fyri eyga at svimja um ein fjørð**

**BRAGD**
*Snorri Brend*

Tá, eins og verið hevði í dag, vóru fjølmiðlarnir stórliga bilsnir av hesum bragdinum. Fyri Bjarna stóðu tí bæði tíðindamenn og myndamenn, tá hann kom aftur at landi.

Eitt av blaðfólkunum á Dimmalætting - tann so vælkendi -n. - skrivar leygardag 10. februar 1968 undir yvirskriftini „Hann svam um Nólsoyarfjørð“, at Bjarni nú hevði gjørt Mariu kunstin eftir. Fyrsti spurningurin var, um tað ikki var kalt av svimja um fjørðin á vetrardegi?

„Undir vanligum viðurskiftum, ja, men í froskmannabúna bilar ikki, heldur tvørtur ímóti. Eg kendi tað heldur í heitara lagi undir ferðini av hesi grund; við svimjifótum og schnorkel bilaði annars ikki at koma fram“, segði Bjarni við blaðið, og leggur aftrat at hann mangan hevði droymt um at gera eina slíka ferð.

## Maltøl á bakinum

Næsti spurningurin frá blaðmanninum á Dimmalætting var, um nakað dramatiskt hendi á ferðini?

„Á, nei, ikki til tað. Eitt sindur øvugt kom fyri, at undir svimjingini komu bæði „Tjaldur“ og „Tróndur“ ov nær, og skóru mær kósina. Drabbut kendist heldur ikki sørt, tá ið eg var einar 1000 metrar frá brimgarðinum í Havn, men tað gekk.

„Ein lítlan støðg gjørdi eg á vegnum, men ikki í samband við bátin, ið fylgdi mær; eg kendi meg eitt sindur svangan, og so tók eg, meðan eg helt mær uppi, eina fløsku av maltøli, sum eg hevði við mær (á bakinum) og drakk hana. Hon styrkti meg væl, og eg kom fram í øllum góðum“, greiðir hann víðari frá.

Seinasti spurningurin frá -n. á Dimmalætting er, um hann kundi hugsað sær at gjørt ferðina umaftur?

„Ja víst, og eg kundi hugsað mær, at ungfólk fóru undir fyri álvara at lykkja kappsvimjing um Nólsoyarfjørð á hvørjum ári upp í ítróttina á sama hátt, sum vit áður hava kappróður og aðrar kappingar“.

# Eg gjørdi tað bara, fyri at gera tað

Í Sosialinum 10. februar 1968 verður staðfest stutt, at Bjarni var í froskmannabúna og svam bert við einum stuttum íhaldi uppá 2 minuttir og leskaði sær eina maltøl. Lagt verður aftrat, at hetta bragdið hevur ikki verið innt fyrr av mannfólki.

14. september hevur samrøðu við Bjarna eftir svmimjitúrin, og greiðir hann her frá, at hann hevði ikki iltfløsku og svam omaná alla tíðina, skiftvíst bringu- og ryggsvimjing.

Spurdur um, hann hevði havt hug at roynt okkurt annað strekki, er hann ikki avvísandi fyri tí. Hann tekur soleiðis til:

„Tað hevði verið spennandi at roynt Suðuroyarfjørð, úr Skúvoy til Sandvíkar. Men hvussu tað verður at gera hug til verk, tað veit eg ikki!“

Í dag, 40 ár eftir minniliga svimjitúrin staðfestir Bjarni bert stutt yvirfyri Sosialinum

- Eg gjørdi tað, bara fyri at gera tað!